# á l i t

## um arbeiðsrætt

1319-1

# Innihaldsyvirlit

Inngangur

Vanligar viðmerkingar

Minnilutatilmæli

Lógaruppskotið

Serligar viðmerkingar

Fylgiskjøl

INNGANGUR

Í samgonguskjalinum hjá landsstýrinum, sum skipað varð millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin í 1989, varð ásett, at arbeiðsrættur skuldi setast á stovn.

Á fundi í landsstýrinum 29. juni 1989 samtykti landsstýrið at seta eina nevnd, hvørs setningur skuldi vera at fyrireika uppskot til løgtingslóg um arbeiðsrætt. Landsstýrið valdi á sama fundi tríggjar løgfrøðingar í nevndina: Tormóður Djurhuus, advokat, Páll Nielsen, advokat, og Jákup Nielsen, fulltrúa í landsstýrinum. Nevndin skipaði seg á sínum fyrsta fundi 14. august 1989 við seinast nevnda sum formanni og skrivara. Nevndin hevur havt 11 fundir í Havn umframt at hava fundast 2 dagar vesturi í Vágum at gera uppskotið liðugt.

Nevndin metir við hesum arbeiði sítt at vera at enda komið, og leggur meirilutin fram hjálagda uppskot til løgtingslóg um arbeiðsrætt við viðmerkingum.

Mælt verður til, at landsstýrið sendir feløgunum á arbeiðs-marknaðinum álitið til ummælis.

Ein minniluti (Páll Nielsen) ger vart við, at hann ikki tekur undir við lógaruppskotinum og ger tessvegna sítt egna tilmæli.

**Tórshavn, tann 18. januar 1990**

**Jákup Nielsen (sign.)**

(Jákup Nielsen)

**Tormóður Djurhuus (sign.)**

(Tormóður Djurhuus)

**Páll Nielsen (sign.)**

(Páll Nielsen)

**Vanligar viðmerkingar:**

Tá ið heimastýrislógin kom í gildi fyri Føroyar, vórðu "Arbeiðsviðurskifti" gjørd til sermál smb. lista A, pkt. 5 til lógina.

Av hesum fylgir, at í Føroyum verður lógin frá 1919 um Den faste Voldgiftsret galdandi við teimum broytingum, sum hesi lóg hevur verið fyri, fram til heimastýrislógin tekur við.

Hetta var so støðan í Føroyum til 1973, tá ið lóg um Arbejdsretten nr. 317 frá 13. juni 1973 verður sett í gildi fyri Danmark, ein lóg, sum samstundis setur úr gildi 1919-lógina um Den faste Voldgiftsret og við tí avtekur dómstólin í arbeiðstrætum við teirri samanseting, sum 1919-lógin ásetur.

1973-lógin um Arbejdsretten er ikki galdandi fyri Føroyar, og førir tað við sær, at hóast spurnartekin kann setast við, um 1919-lógin eisini er sett úr gildi fyri Føroyar, so verða vit at staðfesta, at dómstólurin smb. 1919-lógini er ikki til longur, og er sostatt eingin arbeiðsdómstólur til at døma í føroyskum arbeiðsósemjum.

Ikki fyrrenn við hægstarættardóminum í 1986 í "merkjamálinum", at fáa vit greiði á hesum løgfrøðiliga heldur fløktu viðurskiftum. Hægstirættur kemur til ta niðurstøðu, at "Den med tilslutning af Færøernes Landsstyre gennemførte bestemmelse i § 25 i lov nr. 317 af 13. juni 1973 om Arbejdsretten medførte, at hverken denne lov eller den ved loven ophævede ældre lovgivning derefter var gældende for Færøerne".

Sitandi landsstýri skrivaði tann 11. august 1989 ríkismyndugleikunum bræv (skjal 1 til lógaruppskotið), har upplýst verður, at ætlanin er at seta ein arbeiðsrætt á stovn fyri Føroyar við "sama slag av uppgávum v.m. fyri Føroyar, sum tann arbeiðsrætturin hevur í hinum partinum av kongaríkinum, ið stovnsettur

er við lóg nr. 317 frá 13. juni 1973", og verður samstundis tilskilað í brævinum, at landsstýrið ikki roknar við, at ríkismyndugleikarnir fara at gera atfinningar ímóti, at heimastýrið hesum sermáli viðvíkjandi fremur lóggávu av hesum slagi, haruppií við somu reglum, sum §§ 11 og 12 í lóg nr. 317 frá 13. juni 1973 um Arbejdsretten.

Ríkisumboðið svarar landsstýrinum í brævi frá 20. september 1989 (skjal 2 til lógaruppskotið), at "rigsmyndighederne intet har at indvende imod, at der ved lagtingslov etableres en arbejdsret med de opgaver, som er beskrevet i landsstyrets skrivelse af 11. august 1989".

Annars verður víst til hægstarættardómin í "merkjamálinum", sum er endurgivin í Ugeskrift for Retsvæsen fyri 1986, bls. 314 og blaðgreinir í sama fakriti av Peter Blume í U 1986 B, bls. 278-279, Frederik Harhoff í U 1987 B, bls. 348-352, og Torben Jensen í U 1988 B, bls. 31-35.

Meirilutin í nevndini, sum sett er av landsstýrinum við skrivi frá 5. juli 1989 og við tí setningi at "fyrireika uppskot til løgtingslóg um arbeiðsrætt", hevur við frammanfyri nevnda brævaskifti við ríkismyndugleikarnar í huga gjørt uppskot til løgtingslóg um Arbeiðsrætt Føroya, sum í bygnaði sínum leggur seg uppat tí danska arbeiðsrættinum, hetta eisini við tí í huga, at vit í mong ár hava havt somu rættarskipan sum Danmark á hesum øki, at vit hava eina samanfallandi rættartraditión á økinum og hvat serliga viðvíkur rættargangsreglunum, so er at kalla sama rættargangslógin í gildi í Føroyum sum í Danmark.

Uppskotið skilir seg tó avgerandi frá donski lógini hvat viðvíkur reglunum í § 12, stk. 3 og stk. 4 um appell og regluni í § 13 um endurgjaldsskyldu. Her hevur nevndin í § 13 í lógaruppskotinum valt at skjóta upp eina endurgjaldsskipan, ið er lík teirri skipan, sum galdandi er í hinum Norðanlondunum, heldur enn tí sektarskipan, sum danir hava.

Hetta er eisini støðan hvat viðvíkur møguleikanum fyri at skjóta dómar inn fyri hægri rætt um partur metir, at arbeiðsrætturin hevur dømt í máli, sum ikki kemur undir virkisøki hansara ella rætturin hevur víst frá sær mál við teirri grundgeving, at hann metir, at tað ikki kemur undir virkisøki hansara.

Hvat annars samansetingini av dómstólinum viðvíkur, § 3 í lógaruppskotinum, so hevur nevndin gjølla umhugsað henda spurningin, og er niðurstøðan hjá meirilutanum, at fyriliggjandi uppskot fer at geva eina samanseting av dómstólinum, sum tryggjar, at tann løgfrøðiliga og serfakliga vitanin er tryggjandi umboðað.

Víst verður annars til viðmerkingar til tær einstøku greinirnar.

Viðmerkingar eru gjørdar til §§ 3, 4, 9, 10, 11 og 13.

Endaliga er at siga, at nevndin sær til brúk í arbeiði sínum hevur útvegað sær galdandi lóggávu um arbeiðsrætt í Íslandi, Noregi og Svøríki og sæst, at lóggávan á hesum øki er rættiliga ólík í teimum ymsu norðanlondunum í bygnaði sínum.

**Tilmæli frá minnilutanum (Páll Nielsen).**

Minnilutin Páll Nielsen kann, við teimum grundgevingum, sum niðanfyri eru tilskilaðar, ikki taka undir við lógaruppskotinum og mælir undir verandi umstøðum frá, at arbeiðsrættur verður settur á stovn í Føroyum.

Fyrst er at viðmerkja, at ivasamt tykist vera, um løgtingið hevur heimild at lóggeva um slíkan serdómstól, sum her er talan um.

Eg skal annars fyrst gera nakrar almennar viðmerkingar til spurningin um arbeiðsrætt, og havi at enda viðmerkingar til nakrar av greinunum í lógaruppskotinum frá meirilutanum í nevndini.

Sum kunnugt eru partar av arbeiðsmarknaðinum ímóti at seta á stovn arbeiðsrætt, og meti eg tað tí vera sera ivasamt, um rætt er at seta á stovn slíka skipan.

Ein fyritreyt fyri, at arbeiðsrætturin skal virka eftir ætlan, er, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum taka undir við og hava álit á tí skipan, sum verður sett í verk.

Eg meti tað serliga undir hesum umstøðum vera nátúrligt, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum høvdu fingið sæti í nevndini, og har høvdu fingið beinleiðis ávirkan á tað álit, sum latið verður landsstýrinum.

Hetta er vanlig mannagongd, at teir áhugabólkar, sum ein ætlað lóg kemur at viðvíkja, fáa høvi til beinleiðis at taka lut í tí fyrireikingararbeiði, sum gjørt verður, áðrenn lógaruppskotið verður lagt fram.

M.a. kann viðmerkjast, at í nevndini, sum sett varð í Danmark í 1970 til at fyrireika broytingar í lógini um arbeiðsrættin, sótu umboð fyri bæði løntakarafeløgini og fyri arbeiðsgevarafeløgini.

Mælt verður í innganginum til, at lógaruppskotið verður sent út til partarnar á arbeiðsmarknaðinum til ummælis, men gevur hetta ikki sama møguleika at fáa fram tey ymisku sjónarmiðini og tað orðaskifti millum tey, sum beinleiðis skulu nýta lógina, og sum er sera umráðandi fyri at fáa sett upp og orðað eitt lógaruppskot, ið kann koma at virka eftir ætlan.

Eg meti at skotbráðið, sum nevndin hevur havt, er í so stutt, og førir hetta til, at nevndin ikki í tann mun, sum ynskiligt hevði verið, hevur havt stundir nærri at kanna út í æsir, hvussu ein møgulig lóggáva um fakrættarligu skipan okkara átti at verið orðað við serligum atliti til tey serføroysku viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum.

Sum tað eisini er nevnt aðrastaðni í hesum áliti, so eru lógirnar í grannalondum okkara sera ymiskar, og vísir hetta eisini, at umráðandi er, at tillaga eina møguliga lóggávu eftir viðurskiftunum í tí landi, har skipanin skal virka.

Eg loyvi mær at vísa á, at alstórur munur er á Føroyum og hinum grannalondum okkara, t.d. hvussu feløgini eru skipað ávikavist á løntakarasíðuni og á arbeiðsgevarasíðuni.

Eisini er stórur munur á, hvussu sáttmálaviðurskiftini eru skipað.

Serliga orsakað av tí stuttu tíð, nevndin hevur havt at virka í, síggi eg meg ikke føran fyri at seta fram fullfíggjað uppskot til lóg um fakrættarligu skipan okkara, sum í nóg stóran mun hevur atlit til serligu viðurskifti okkara.

Eg skal tó gera nakrar viðmerkingar til sjálvt lógaruppskotið hjá meirilutanum í nevndini. Sí soleiðis undir serligum viðmerkingum til § 10 (virkisøki) og § 13 (endurgjald).

# U p p s k o t

til

<u>løgtingslóg um Arbeiðsrætt Føroya</u>.

<u>§ 1.</u> Settur verður á stovn Arbeiðsrættur Føroya.

<u>§ 2.</u> Arbeiðsrætturin hevur sæti í Tórshavn. Í serligum førum kann arbeiðsrætturin verða settur uttanfyri Tórshavn.

<u>§ 3.</u> Arbeiðsrættur Føroya hevur 13 limir:

1) Rættarformaðurin, sum er sorinskrivarin í Føroyum, ella ein løgfrøðingur, sum hann tilnevnir.
2) 6 meðdómarar fyri løntakaraáhugamálum, ið verða valdir soleiðis:
   a) Føroya Arbeiðarafelag velur 2 meðdómarar.
   b) Ein valbólkur av Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Arbeiðskvinnufel-

agið Fjallbrúður velur 1 meðdómara.

c) 1 valbólkur av Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagnum velur 1 meðdómara.

d) 1 valbólkur av Føroya Handverkarafelag, Sjúkrasystrafelag Føroya og Føroya Sjúkrahjálparafelag velur 1 meðdómara.

e) 1 valbólkur av Starvsmannafelagnum, Føroya Postfelag og S & K-felagnum velur 1 meðdómara.

3) 6 meðdómarar fyri arbeiðsgevaraáhugamál, ið verða valdir soleiðis:

a) Føroya Arbeiðsgevarafelag velur 2 meðdómarar.

b) Føroya Reiðarafelag velur 1 meðdómara.

c) Føroya Handverksmeistarafelag velur 1 meðdómara.

d) Føroya Keypmannafelag velur 1 meðdómara.

e) Ein valbólkur av Føroya Landsstýri, Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommunu velur 1 meðdómara.

Stk. 2. Samstundis sum meðdómarar verða valdir, velur sorinskrivarin tveir løgfrøðingar sum vararættarformenn, og hvørt felag ella hvør valbólkur tveir varameðdómarar.

Stk. 3. Tilnevndur rættarformaður og tilnevndir vararættarformenn verða valdir fyri trý álmanakkaár í senn. Um ein teirra doyr ella flytir av landinum, velur sorinskrivarin annan løgfrøðing í hansara stað fyri tað írestandi valskeiðið.

Stk. 4. Meðdómarar og varameðdómarar verða valdir fyri trý ár í senn, og kunnu teir í hesum tíðarskeiði ikki avsetast. Teir eru í virki sínum óheftir av boðum frá feløgum, sum hava valt teir.

Stk. 5. Tað er borgarlig skylda at taka við vali sum meðdómari og varameðdómari.

Stk. 6. Meðdómararnir og varameðdómararnir skulu vera borgarar í landinum, hava heimstað í Føroyum, vera myndugir og hava ræði á búgvi sínum.

§ 4. Í hvørjum máli dømir ein rættarformaður ella vararættarformaður og fýra meðdómarar ella varameðdómarar, tveir valdir eftir § 3, stk. 1, nr.

2, og tveir valdir eftir § 3, stk. 1, nr. 3.

Stk. 2. Um ein partur ynskir tað og rættarformaðurin og vararættarformennirnir taka undir við tí, verður mál av stórum prinsipiellum týdningi ella við óvanliga stórum avleiðingum, dømt av rættarformanninum og báðum vararættarformonnunum og seks meðdómarum ella varameðdómarum, tríggir valdir eftir § 3, stk. 1, nr. 2, og tríggir valdir eftir § 3, stk. 1, nr. 3.

Stk. 3. Tá undantikin eru mál, sum dømd verða eftir stk. 2, gera rættarformaðurin og vararættarformenninir í felag av, hvør teirra skal døma í hvørjum einstøkum máli.

Stk. 4. Fyri hvørt mál sær ger rættarformaðurin av, hvørjir meðdómarar ella varameðdómarar, sum skuldu døma, og verður tá at miða ímóti, at felag teirra ikki hevur beinleiðis áhuga í viðkomandi máli.

§ 5. Sorinskrivarin tilnevnir skrivara hjá arbeiðsrættinum, og kann hetta vera ein vararættarformaður.

§ 6. Hvørja ferð meðdómarar og varameðdómarar skulu veljast, gevur landsstýrið áðrenn 1. september boð til tey feløg, sum umrødd eru í § 3, stk. 1, nr. 2 og 3, um at velja meðdómarar og varameðdómarar, og at boða landsstýrinum og sorinskrivaranum frá innan 1. november.

Stk. 2. Um valbólkar, sum umrøddir eru í § 3, stk. 1, nr. 2 litra b), c), d) og e), og í § 3, stk. 1, nr. 3, litra e) ikki kunnu semjast um at velja meðdómarar og varameðdómarar, ger hvørt felag/stovnur sær tilmæli til landsstýrið áðrenn 1. november, og velur landsstýrið tá meðdómarar og varameðdómarar millum teirra, sum tilmældir eru, og gevur sorinskrivaranum boð um valið.

Stk. 3. Um feløg sambært § 3, stk. 1, nr. 2, litra a), og § 3, stk. 1, nr. 3, litra a), b), c) og d), ikki velja meðdómarar og varameðdómarar innan 1. november ella feløg og stovnar, sum eru í valbólki eftir § 3, stk. 1, nr. 2, litra b), c), d) og e), ella § 3, stk. 1, nr. 2, litra e), ikki velja ella koma við tilmæli eftir stk. 2

innan 1. november, velur landsstýrið innan 1. desember viðkomandi meðdómara og varameðdómara og boðar sorinskrivaranum frá. Miðað eigur at verða ímóti at arbeiðsgevara- og løntakarasíðan eru javnt umboðað.

§ 7. Tá vararættarformenn, meðdómarar og varameðdómarar eru valdir, heldur rættarformaðurin í desember mánaði kunnandi fund fyri øllum vararættarformonnunum, meðdómarunum og varameðdómarunum.

§ 8. Føroya Landsstýri ásetir reglur um samsýning fyri rættarformannin, vararættarformenninnar, meðdómararnar, varameðdómararnar og skrivaran, umframt reglur um skrivstovuhald.

§ 9. Útreiðslur til skrivstovuhald, samsýningar v.m. verða játtaðar á løgtingsins fíggjarlóg.

§ 10. Hesi mál kunnu verða løgd fyri arbeiðsrættin:

1) Brot á sáttmálar um løn og arbeiðsviðurskifti millum løntakarafeløg øðrumegin

og arbeiðsgevarafeløg ella einstakan arbeiðgevara hinumegin.

2) Um fráboðað felags stríðsstig eru lóglig,

3) um felagssáttmáli fyriliggur.

4) um loyvt er at nýta felags stríðsstig til stuðul fyri krav um sáttmála á økjum, har felags sáttmáli ikki er gjørdur.

Stk. 2. Arbeiðssteðgur skal beinanvegin verða fráboðaður feløgunum, og felagsfundur við feløgini, har samráðst verður um arbeiðssteðgin, skal verða hildin í seinasta lagi dagin eftir, at arbeiðssteðgurin er settur í verk, uttan so at arbeiðssteðgurin er hildin uppat, áðrenn felagsfundurin verður hildin.

Stk. 3. Mál sambært stk. 1, nr. 1-2 kunnu bert verða skotin inn fyri arbeiðsrættin, um brotið er gjørt ella stríðsstigið er fráboðað ella sett í verk av einum arbeiðsgevarafelag ella einum ella fleiri limum í einum slíkum, av einum einstøkum virki (einstaklingur, firma, partafelag ella almennur stovnur) ella av einum løntakarafelag ella av limum í einum slíkum felag saman.

**Stk. 4.** Umframt tey í stk. 1 nevndu mál kunnu ósemjur millum arbeiðsgevarar og løntakarar verða lagdar fyri arbeiðsrættin, tá hann játtar hesum, og avtala millum arbeiðsgevara- og løntakarafelag ella millum einstakt virki og løntakarafelag er gjørd um hetta.

**Stk. 5.** Mál, sum sambært sáttmála millum feløg skulu viðgerast av gerðarrætti, kunnu ikki leggjast fyri arbeiðsrættin til avgerðar uttan so, at partarnir eru samdir um hetta.

**§ 11.** Verður mál lagt fyri arbeiðsrættin har spurningurin snýr seg um at døma lutvíst um ein byrjaður arbeiðssteðgur er brot á sáttmála og lutvíst at døma endurgjald, kann arbeiðsrætturin, um so er, at seinni spurningurin krevur gjøllari kanning, taka fyribils avgerð í fyrra spurninginum.

**§ 12.** Dómar í arbeiðsrættinum eru endaligir, og kunnu ikki verða skotnir inn fyri annan rætt ella fyrisitingarligan stovn.

**Stk. 2.** Sak kann ikki verða løgd fyri vanliga dómstólin

um mál, ið sambært § 10 hoyra undir dómsøkið hjá arbeiðsrættinum.

Stk. 3. Um partur heldur, at Arbeiðsrætturin hevur dømt í máli, sum ikki kemur undir dómsøki hansara eftir § 10, kann viðkomandi partur skjóta henda spurningin inn fyri Eystara Landsrætt innan 4 vikur aftaná, at dómur er feldur.

Stk. 4. Um rætturin vísir mál frá sær av teirri orsøk, at málið ikki kemur undir dómsøkið hansara eftir § 10, kann avgerðin verða kærd til landsrættin á sama hátt sum í stk. 3.

§ 13. Endurgjald fyri brot á sáttmála ella ólógligan arbeiðssteðg, ásetir arbeiðsrætturin eftir vanligum endurgjaldsreglum í mun til fíggjarligt tap, ábyrgd og fíggjarorku skaðavaldarans, viðurskiftini hjá honum, ið verið hevur fyri tapi og umstøðunum annars. Undir serligum umstøðum kann endurgjaldið falla burtur.

§ 14. Tað er viðkomandi arbeiðsgevara- ella løntakarafelag, sum leggur sak og sum sak verður løgd ímóti, sama

um brotið er framt ella kollektivt stríðsstig er frá-boðað ella sett í verk av ella ímóti einstøkum limum í felagnum. Er felag limur í einum størri felag, so er tað hetta felag, sum er sakar-málspartur. Er arbeiðs-gevaraparturin eitt virki smb. § 10, stk. 3, ið ikki er limur í nøkrum arbeiðs-gevarafelag, so er tað virkið sjálvt, sum er sakarmáls-partur.

**§ 15.** Sakarmál verður tikið upp á tann hátt, at hin stevnandi letur arbeiðs-rættinum kærurit í tveimum eintøkum.

**Stk. 2.** Skrivarin sendir sum skjótast eitt eintak av kæru-ritinum til hin stevnda og krevur samstundis, at hann letur inn svarrit í tveimum eintøkum. Svarritið verður at lata inn til rættin innan eina av skrivaranum ásetta freist. Tá ið svarritið er latið inn, sendir skrivarin eitt eintak av hesum til hin stevnandi. Við hesum er skrivligi parturin av rættar-málsviðgerðini vanliga lokin.

**Stk. 3.** Til tess at royna seming í málinum ella at fáa tilvega fleiri viðmerkingar

frá pørtunum, kunnu partarnir boðsendast til fyrireikandi rættarfund, har rættarformaðurin ella ein av varaformonnunum er einsamallur í sæti.

§ 16. Arbeiðsrætturin kann um neyðugt lata stevning kunngera fyri stevnda eftir reglunum í kap. 17 í rættargangslógini.
Stk. 2. Møtir stevndi ikki hóast fráboðaður sambært stk. 1, galda reglurnar í §§ 354, 360 og 362 í rættargangslógini. Rættarformaðurin kann einsamallur fella fráverudóm.
Stk. 3. Tann, sum stevndur er fyri arbeiðsrættin, hevur skyldu at møta.

§ 17. Tað eru ongar avmarkingar galdandi fyri partarnar hvat tí viðvíkur at lata seg umboða av fulltrúa undir málsviðgerðini í arbeiðsrættinum. Rætturin avger í hvønn mun ein partur kann luttaka í viðgerðini fyri rættin við fleiri fulltrúum, og avger rætturin eisini, hvør kann fáa atgongd til rættarfundirnar umframt partarnar sjálvar og teirra sakarmálsfulltrúar.

§ 18. Rættarformaðurin avger við úrskurði tær trætur, sum í samband við vitnisførslu og sýnismetingar taka seg upp í samband við málsviðgerðina.

§ 19. Um viðgerðarháttin annars galda við neyðugum tillagingum tær fyri borgarligar sakir galdandi grundreglur í rættargangslógini 2. bók og kap. 28, 29 og 30.
Stk. 2. Rættarbók verður at skriva eftir reglunum í rættargangslógini kap. 3.

§ 20. Dómar feldir av arbeiðsrættinum, kunnu innast eftir reglunum í rættargangslógini um tvingsilsfulnað av dómum. Semjur gjørdar í arbeiðsrættinum, kunnu innast eftir reglunum í rættargangslógini um fulnað av semjum, sum gjørdar eru innanrætta.

§ 21. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi "Lov nr. 536 af 4. oktober 1919 om Den Faste Voldgiftsret" við seinni broytingum.

Serligar viðmerkingar:

Til § 3.

Í hesi grein er ásett, at formansskapurin er myndaður av trimum løgfrøðingum og at meðdómararnir verða valdir av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum soleiðis, at ávikavist arbeiðsgevarasíðan og løntakarasíðan velja hvør sínar 6 meðdómarar. Harumframt verða valdir varameðdómarar í sama lutfalli. Viðmerkjast skal, at tey løntakarafeløg, sum sett eru at velja meðdómarar og varameðdómarar umboða meginpartin av løntakarunum, og at tað m.a. av umsitingarligum orsøkum ikki ber til at lata øll løntakarafeløg luttaka í hesum vali.

Til § 4.

Eftir hesi grein luttaka vanliga 5 dómarar í rættarmálsviðgerðini. Tveir valdir av arbeiðsgevarasíðuni og tveir valdir av løntakarasíðuni umframt rættarformaðurin. Vegna tess at dómar í arbeiðsrættinum ikki kunnu skjótast inn fyri hægri rætt verður mælt til, at 9 dómarar luttaka í sakarmálsviðgerðini, tá talan er um mál av stórum prinsipiellum týdningi ella hava óvanliga stórar avleiðingar: Tríggir valdir av arbeiðsgevarasíðuni og tríggir av løntakarasíðuni umframt rættarformaðurin og báðar vararættarformenninar.

Fyri at fáa eina objektiva avgerð, verður mælt til, at miðað verður ímóti, at tey feløg, sum valt hava meðdómararnar, ikki hava beinleiðis áhuga í málinum, sum viðgjørt verður

Til § 9.

Skotið verður upp, at tað almenna ber útreiðslurnar í samband við virki arbeiðsrættsins við árligari játtan á løgtingsins fíggjarlóg.

Til § 10.

Í hesi grein verður skotið upp hvørji mál kunnu leggjast fyri arbeiðsrættin: Brot á sáttmála um løn og arbeiðsviðurskifti, um

fráboðað felagsstríðsstig eru lóglig, um felagssáttmáli fyriliggur og um loyvt er at nýta felags stríðsstig til stuðul fyri krav um sáttmála á økjum, har felagssáttmáli ikki er gjørdur. Spurningar um tulking av sáttmála kunnu ikki leggjast fyri arbeiðsrættin uttan so, at partarnir eru samdir um tað, hetta vegna tess at hin beinleiðis sáttmálatulkingin vanliga er løgd til sáttmálabundnan gerðarrætt at avgreiða. Um partarnir ynskja tað og rætturin játtar hesum, kunnu mál, sum snúgva seg um aðrar ósemjur millum arbeiðsgevarar leggjast fyri arbeiðsrættin til avgerðar.

<u>Minnilutaviðmerking:</u>
Sum nr. 2 í fyrsta petti er mælt til, at arbeiðsrætturin skal avgera, um "fráboðað felags stríðsstig eru lóglig".

M.a. í kommenteraðu donsku arbeiðsrættarlógini, bls. 39, verður beinleiðis sagt, at ein fyritreyt fyri hesi reglu tykist at vera, at sáttmáli er partanna millum, ið ásetir, at áðrenn partarnir taka nøkur stig í arbeiðsósemjum, so skal hetta fráboðast við ávísum freistum.

Mær vitandi er tað bert <u>ein</u> sáttmáli í Føroyum, ið ásetir slíkar ávaringarfreistir, meðan hinir sáttmálarnir, sum fevna um meginpartin av føroyska arbeiðsmarknaðinum, als ikki hava slíkar ávaringarfreistir.

Eg meti tí ikki, at tað er rætt og heldur ikki neyðugt at seta slíka reglu inn í eina møguliga lóg.

<u>Til § 11.</u>
Fyri at fáa eina skjóta avgerð um ein byrjaður arbeiðssteðgur (verkbann ella verkfall) er í stríð við galdandi sáttmála, verður skotið upp, at avgerð um henda spurning verður tikin skjótast til ber, meðan spurningurin um møguligt endurgjald, um hesin krevur gjøllari kanning, kann takast við eini seinni avgerð.

**Til § 13.**

Grundsjónarmiðið í § 13 er, at skaði, sum gjørdur er í samband við ólógliga framferð, skal samsýnast tí, sum fyri missi hevur verið, eftir vanligum endurgjaldsreglum, tó soleiðis at rætturin kann minka um endurgjaldsupphæddina alt eftir umstøðunum í málinum, og kann hann í serligum føri heilt strika endurgjaldið. Nevnast kann, at nevndin við uppskoti sínum hevur valt at leggja seg á endurgjaldssjónarmiðið, soleiðis sum gjørt er í hinum Norðurlondunum, heldur enn at skjóta upp ta sektarskipan, sum danir hava.

**Minnilutaviðmerking:**

Eg eri samdur við meirilutanum í, at reglurnar um sekt ikki eiga at verða settar í gildi í Føroyum.

Eingin ivi eigur at vera um, at her, sum á øðrum økjum, eiga vanligu endurgjaldsreglurnar at vera galdandi.

Eg meti tó ikki, at heimildin at døma endurgjald eigur at flytast frá vanligu dómstólunum til ein møguligan arbeiðsrætt.

Um arbeiðsrætturin verður settur á stovn, so dugi eg ikki at síggja nakra haldgóða grund til, at hesin arbeiðsrættur skal hava heimild at taka støðu til endurgjaldskrøv partanna millum.

Eg meti tað fyri rættartrygdina vera sera umráðandi, at tað framvegis verða vanligu dómstólarnir, ið skulu døma í slíkum málum, soleiðis at partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum allir aðrir persónar í samfelag okkara, framvegis hava møguleika fyri at leggja spurningin um endurgjald fyri hægri rætt.

Í rættarskipan okkara er tað ein meginregla, at dómar, sum feldir eru, altíð skulu kunna roynast í hægri rætti, og eg meti ikki, at nakað talar fyri at gera broytingar í hesi skipan, soleiðis at ein møguligur arbeiðsrættur tekur endaliga støðu til slík endurgjaldskrøv.

Skjal 1

# FØROYA LANDSSTÝRI

*FR-110 Tórshavn,*
Tlf. 11080 . Telex 81310 tingas fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

11. august 1989

F. L. j. nr. 1319-1
(at tilskila í svari)

KlH/or

Við støði í samgonguskjalinum millum landsstýrisflokkarnar, hevur Føroya Landsstýri gjørt av at fremja tiltak til stovnsetan av Arbeiðsrætti fyri Føroyar. Hugsað verður um, at hesin skuldi hava sama slag av uppgávum v.m. fyri Føroyar, sum tann Arbeiðsrætturin hevur í hinum partinum av kongaríkinum, ið stovnsettur er við lóg nr. 317 frá 13. juni 1973.

Landsstýrið hevur sett arbeiðsbólk við teirri uppgávu áðrenn 15. september at gera uppskot til løgtingslóg um hetta, soleiðis at landsstýrið í løgtinginum kann seta fram tílíkt uppskot.

Spurningurin um viðurskiftini í Føroyum í so máta hevur verið frammi í dómi hjá Hægstarætti frá 20. februar 1986 (Ugeskrift for Retsvæsen 1986.314) millum tveir føroyskar partar. Torben Jensen, hægstarættardómari, hevur í Ugeskrift for Retsvæsen 1988, bls. 31, gjørt viðmerkingar til dómin og rættarstøðuna annars.

Serliga tá hugsað verður um, at hægstarættardómarin - hóast óbeinleiðis - setir fram áheitan um lóggávu í hesum sermáli, roknar landsstýrið við, at ríkismyndugleikarnir ikki fara at gera atfinningar ímóti, at heimastýrið hesum sermáli viðvíkjandi fremur lóggávu av tí slagi, sum leysliga er umrødd frammanfyri, haruppií við reglum av sama innihaldi, sum §§ 11 og 12 í "Lov nr. 317 af 13. juni 1973 om arbejdsretten".

Fyri ordans skuld biður landsstýrið um váttan um, at tílíkar atfinningar verða ikki gjørdar.

[signature]
varaløgmaður

[signature]
Klaus Hermann

Rigsombudsmanden på Færøerne
her

Skjal 2

RIGSOMBUDSMANDEN PA FÆRØERNE
Postboks 12 . FR-110 Tórshavn
Telf. (009-298)11040

Dato 20 SEP. 1989

J. nr. 36-10-114/1989
(bedes anført ved alle henvendelser)

hen/lgf.

Færøernes landsstyre,
Postboks 64,
110 Tórshavn.

Ved skrivelse af 11. august 1989 har Færøernes landsstyre rettet henvendelse til Rigsombudet vedrørende oprettelsen af en Arbejdsret på Færøerne.

Det fremgår af skrivelsen, at Færøernes landsstyre agter at fremsætte forslag i Lagtinget om lagtingslov om oprettelse af en Arbejdsret på Færøerne.

Arbejdsretten på Færøerne skal efter forslaget have den samme type opgaver, som Arbejdsretten har i Danmark, jfr. lov nr. 317 af 13. juni 1973 om arbejdsretten.

Færøernes landsstyre ønsker bekræftelse på, at der ikke fra rigsmyndighedernes side fremkommer indsigelser herimod.

I den anledning skal man meddele, at rigsmyndighederne intet har at indvende imod, at der ved lagtingslov etableres en arbejdsret med de opgaver, som er beskrevet i landsstyrets skrivelse af 11. august 1989.

Med venlig hilsen

Bent Klinte

22 SEP. 1989

F. L. j. nr. 1319-1 14